## Anfinn fekk føðingardagsgávu

Landsfundurin hjá Fólkaflokkinum leygardagin var ein heilt serligur fundur fyri Anfinn Kallsberg, Hetta var fyrsti landsfundur í ewitt langt áramál, har hann ikki stendur sum formaður – og so hevur hann akkurát fylt 60. Og hetta gloymdu tey í flokkinum ikki. Í hesum sambandi handaði Jørgen Niclasen, floksformaður, Anfinn Kallsberg eina gávu, sum var ein málningur sum Ólavur í Beiti hevur málað og sum ímyndar politiska lívið hjá gamla formanninum, eisini tað meiri baldrutu síðuna av politisku tilveruni



# Valskipanin fremur framvegis ikki lutfalsval

**Við ikki at broyta útrokningarháttin til løgtingsval fremur nýggja valskipanin við Føroyum sum eitt valdømi ikki rættvísari býti millum flokkarnar. Varð roknihátturi broyttur, høvdu smáu flokkarnir fingið betri umboðan á tingi**

LØGTINGSVAL
*Jógvan Mørkøre*

Seinasta løgtingsval gav sum ikki einaferð eitt tingmannabýti, sum ikki var í samsvar við býtið í atkvøðum um landið. Tað høvdu vit sæð so mangan fyrr. Tað, sum var serligt hesuferð, var, at triði størsti flokkur í atkvøðum, gjørdist størstur á tingi. Tað fekk nýggju samgonguna at taka málið við í samgonguskjalið. Úrslitið gjørdist, at vit fingu eitt valdømi í staðin fyri sjey. Men grundleggjandi skeivleikarnir, ið gera, at vit ikki fáa eitt rættvíst býti í mun til atkvøðutalið, vórðu fluttir við. Sjálvstýrisflokkurin hevur uppskot til enn eina broyting, sum skal rætta upp uppá hetta.

### Tey skeivu úrslitini, tí vit brúka d'Hondt

Vit hava fyrr sæð margháttlig úrslit, sum mugu sigast at vera skeiv. Tey eru ikki skeiv sambært verandi løgtingsvallóg, men tey eru skeiv, tá ið endamálið við at hava ta skipan, vit hava, er at tryggja lutfalsliga umboðan í Løgtinginum. Tað vil siga, at flokkarnir eiga at fáa eina umboðan á tingi, sum svarar til ta undirtøku, teir hava ímillum veljararnar. So nær sum gjørligt við tí avmarkaða tingmannatali, vit hava.

Tá ið vallógin varð endurskoðað í 1978, varð talið á møguligum eykavaldum minkað úr 10 niður í 5. Samstundis vórðu valdømisvaldu øðrvísi býtt millum valdømini, og samlaða talið varð økt úr 20 upp í 27. Talan varð um eina tillaging til broyttu fólkasamansetingina í valdømunum. T.d. fekk Suðurstreymoy 8 við lógarbroytingini í mun til 4, sum valdømið hevði havt í eitt mannaminni.

Samanumtikið var valreformurin kortini eingin ábót. Gamaní fekst eitt rættvísari býti millum valdømini, men at minka talið av eykavaldum úr 10 niður í 5, samstundis sum hildið varð fast við gamla uppgerðarháttin, eisini nevndur d'Hondt-hátturin, var eitt mistak. Við d'Hondt-háttinum, sum vit enn brúka, býta vit í valdøminum atkvøðutalið hjá einstøku flokkunum við 1,2,3,4. Tað er viðurkent millum valserfrøðingar, at d'Hondt-uppgerðarhátturin gevur størri frávik frá tí reina lutfallinum enn aðrar skipanir. Serliga til fyrimuns fyri teir stóru flokkarnar. Kravið til talið av eykavaldum at javna við var tí tað størri, og tað vísti seg beinanvegin, at 5 eykavald strekti ikki til.

Nú kundu vit vænta, at løgtingið, tá ið valskipanin varð endavend, fekk bilbukt við hesar skeivleikar. Men nei. Hóast vit í dag eingi eykavald hava í skipanini, og har tískil ikki eru nøkur at javna við, so brúka vit kortini d'Hondt. Føroyar eru allar eitt valdømi, og tí eru tey eykavaldu, sum vórðu brúkt at javna ójavnarnar millum valdømini, dottin burtur.

Tað hevur eydnast løgtinginum at endurtaka mistakið frá 1978. Og setningurin í samgonguskjalinum um at fáa eina rættvísari skipan er tí ikki rokkin.

Ein útrokning, ið byggir á úrslit frá seinastu veljarakanningini, vísir, at hevði hetta blivið valúrslitið, so høvdu Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fingið sama tingmannatal, nevniliga 8, hóast umleið 2 prosent eru á muni í veljaraundirtøku. Gamaní er hetta frægari samanborið við tað, ið hendi á seinasta vali, tá ið Tjóðveldisflokkurin fekk ein meira enn Sambandsflokkin, hóast hann hevði 2 prosent minni í veljaraundirtøku. Sjálvstýrisflokkurin hevði bert fingið ein tinglim. Fyri Tjóðveldisflokkin hevði verið talan um eina yvirumboðan upp á 2,4 %, fyri Sjálvstýrisflokkin ein undirumboðan upp á 1,7 %.

### Um vit vilja hava val við skili í Sainte-Laguë-uppgerðarháttur

Aðrastaðni, har roynt verður at hava lutfalsval til tjóðarting, er Sainte-Lague-hátturin komin í staðin fyri d'Hondt. Munurin liggur í, at við d'Hondt-háttinum, sum vit enn brúka, býta vit í valdøminum atkvøðutalið hjá einstøku flokkunum við 1,2,3,4 osfr. Sainte-Lague-hátturin – ella staktalshátturin – brúkar staktøl, 1,3,5 osfr. at býta við. Tá ið valdømisvaldu tinglimirnir skulu finnast í valdøminum, fær tann flokkur, ið hevur flestar atkvøður fyrst valda tinglimin. Síðani verður atkvøðutalið býtt við 2 í d'Hondt og við 3 í Sainte-Lague-háttinum, og hugt verður eftir, um talið framvegis er størri enn tey óbýttu hjá kappingarneytunum. Er tað tað, fær flokkurin eisini næst valda, og síðani verður atkvøðutalið býtt við 3 í d'Hondt-skipanini og við 5 í Sainte-Lague. Stórir flokkar fáa soleiðis meira burtur úr d'Hondt-skipanini, samstundis sum

| d'Hondt, býtistøl 1,2,3,4... | Landsúrslit | Tinglimir | Lutfalslig tingumboðan | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 18,9 | 6 | 18,2 | 0,7 |
| Sambandsflokkurin | 23,8 | 8 | 24,2 | -0,4 |
| Javnaðarflokkurin | 20,1 | 7 | 21,2 | -1,1 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,8 | 1 | 3,0 | 1,7 |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,9 | 8 | 24,2 | -2,4 |
| Miðflokkurin | 10,5 | 3 | 9,1 | 1,4 |
| **Tils.** | 100,0 | 33 | 100,0 | |

| Sainte-Laguë, býtistøl 1,3,5,7... | Landsúrslit | Tinglimir | Lutfalslig tingumboðan | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 18,9 | 6 | 18,2 | 0,7 |
| Sambandsflokkurin | 23,8 | 8 | 24,2 | -0,4 |
| Javnaðarflokkurin | 20,1 | 7 | 21,2 | -1,1 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,8 | 2 | 6,1 | -1,3 |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,9 | 7 | 21,2 | 0,7 |
| Miðflokkurin | 10,5 | 3 | 9,1 | 1,4 |
| **Tils.** | 100,0 | 33 | 100,0 | |

| Størsti brøkur | Landsúrslit | Tinglimir | Lutfalslig tingumboðan | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 18,9 | 6 | 18,2 | 0,7 |
| Sambandsflokkurin | 23,8 | 8 | 24,2 | -0,4 |
| Javnaðarflokkurin | 20,1 | 7 | 21,2 | -1,1 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,8 | 2 | 6,1 | -1,3 |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,9 | 7 | 21,2 | 0,7 |
| Miðflokkurin | 10,5 | 3 | 9,1 | 1,4 |
| **Tils.** | 100,0 | 33 | 100,0 | |

*Talvurnar vísa úrslitið av seinastu veljarakanning hjá Sosialinum – roknað út eftir ávikavist d'Hont-háttinum, Sainte-Lague-háttinum og um roknað varð eftir størsta brøki. Sum talvan vísir, so fæst ikki tað rættvísi í skipanina, sum var grundarlagið fyri at gera Føroyar til eitt valdømi. Verður roknihátturin broyttur, bøtir tað um støðuna hjá smáu flokkunum*

hon krevur, at eitt størri tal av eykavaldum tinglimum má til fyri at javna teir mismunir, ið uppstanda, og til tess at tryggja, at talan er um lutfalsval í landinum sum heild.

Okkara valskipan er óheppin, tí at vit hava framvegis d'Hondt-háttin at býta valdømisvaldu við, samstundis sum vit eingi eykavald hava til at javna teir mismunir, ið verða fyri landið sum heild.

Valserfrøðingar hava nú í mong Harrans ár mælt føroyingum til at fara frá d´Hondt til Sainte-Laguë. Seinast Petur Zachariassen í sambandi við broytingarnar í vallógini, ið gjørdu Føroyar til eitt valdømi. Bæði í Sjónvarpi og í bløðunum. Men tað er so eiðasørt, at lurtað verður eftir serfrøðini á hesum økinum.

Gera vit úrslitið frá seinastu veljarakanningini upp eftir tilmælda uppgerðarháttinum, so fær Tjóðveldisflokkurin ikki 8, men 7 tingumboð. Størsta frávikið verður tað hjá Miðflokkinum, ið fær eina eina yvirumboðan upp á 1,4 %, men tað er so innanfyri tað mark, vit noyðast at liva við einum avmarkaðum tingmannatali. Meðalprísurin fyri tinglimin er í dag 1/33, tvs. 3%, so yvirumboðan og undirumboðan vilja kunna tátta í 1,5% sjálvt í teirri bestu valskipanini.

### Uppskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum

Sjálvstýrisflokkurin hevur valt at brúka orðingar í gomlu vallógini fyri at koma nærri einum rættvísum býti.

Tað var so, at uppgerðin í teimum einstøku valdømunum fór fram eftir d'Hondt. Síðani – eftir at tey valdømisvaldu vórðu funnin – so blivu tey eykavaldu løgd afturat. Tað var ein skipan, sum tók alt landið undir einum. Sum um talan var um eitt valdømi. Og uppgerðin fór fram eftir størsta brøk-háttinum.

Tað er so logikkurin í uppskotinum, at tá ið tey sjey valdømini eru dottin burtur, so eigur d'Hondt at fara í søguna við teimum. Og eftir eru so 33 tinglimir, sum kunnu metast øll at vera eykavald. Og tí kunnu tey gerast upp eftir háttinum við størsta brøki.

Í stuttum inniber uppteljingin, at lutfalsligi parturin hjá hvørjum flokki av teimum 33 verður útroknaður. Tað gevur ongantíð heil tøl, men tøl, har ein rúgva av tølum vilja standa aftan fyri kommaið. Sum vera man, so mugu tinglimirnir, ið býtast skulu, vera heilir. So her má rundast upp og niður. Soleiðis sum farið verður fram eftir hesum háttinum, so verður tað, sum stendur aftan fyri kommaið goymt fyri fyrst. Tað verður rundað niður til heil tøl so at siga. Tey verða síðani løgd saman fyri flokkarnar. Gevur talið 33, so er alt gott, men tað vil tað bert geva í onkrum heilt fáum førum. Vanliga vil tað verða minni. Gevur tað t.d. 30 sum í útrokningini í hesi grein, so verða 3 tinglimir at býta upp á teir flokkar, sum hava størstu tølini aftan fyri kommaið.

Rokna vit út við veljarakanningini sum botn, so fáa vit nett tað sama úrslitið sum við at brúka Sainte-Laguë.

Tað vil hesin hátturin í teimum flestu førunum. So hann verður mettur at vera næstan eins góður, men fyri landið sum heild hevði fingist eitt býti, sum er meira.